# Funnu gomul vrak



Tá menn nú um dagarnar vóru í ferð við at grava út fyri einum hotelli í norska býnum Larvik, komu teir niður á leivdirnar av ikki minni enn tveimum skipsvrakum. Boð vórðu alt fyri eitt send eftir fornfrøðingum hjá Sjóferðslusavninum, og teir kundu rættiliga skjótt staðfesta, at talan er um leivdirnar av tveimum skipum, sum vórðu smíðað í 17. øld. Skipini, tvey farmaskip, eru úr eik, og tey hava verið millum 40 og 45 føtur long.

# Hækka skattin

Júst sum danska stjórnin hevur boðað frá skattalætta næsta ár, kunngera fleiri danskar kommunur, at tær fara at hækka skattin á nýggjárinum. Stjórnin og kommunurnar hava avtalað, at kommunurnar kunnu taka í mesta lagi 700 mió. krónur meiri í 2008 enn í ár við at hækka skattin, men tær kommunurnar, sum hava boðað frá skattahækking, ætla sær at taka 1,9 mia. krónur meiri næsta ár. 75 prosent av kommununum ætla sær at hækka skattin, sigur TV2.



*Konsertin sunnudagin byrjar klokkan 15*

# Harmoni-vikuskifti á Eiði

**Sunnudagin verður stór blásarakonsert í Ítróttarhøllini á Eiði**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Talan erum eitt harmoniorkestursamanspæl hjá musikkskúlanum. Norðljómur, Musikkskúlin í Eiðis og Sunda kommunum, verður 20 ár í 2008, og í tí sambandi verður skipað fyri ymiskum tiltøkum í hesum skúlaári. Eitt nú er ætlanin at framføra eitt nýskrivað verk á flaggdegnum.

Norðljómur hevur nógvar ungar, dugnaligar leikarar, sum bjóða seg fram at spæla, um so er, at boð er eftir teimum, t.d. spældu nakrar floytur til framsýningina hjá Fornminnafelagnum á Eiði seinasta vikuskifti. Næmingaorkestrið, sum er eitt harmoniorkestur, hevur spælarar úr allari oynni. Í Norðljómi eru eisini góðir guitar og klaverspælarar, og nakrir næmingar hava tikið seg saman í bólkin Oyrarvox, sum hevur spælt til ymisk høvi.

Á hesari konsertini verða tað trý harmoniorkestur fyri byrjarar, miðal og framkomin. Í samband við teirra spæl verður ein sangari, sum nevnist Katrina Petersen. Hon fer at syngja við teimum nøkur svingløg, sum hon hevur serligt hegni til. Tey, sum hava hoyrt hana syngja, siga, at hon kann vekja órørdar kenslur, soleiðis at fólk verða í serstakliga góðum lag av hennara sangi.

SALONG
Cassiopeia
v/Marjun Poulsen Tlf:423610



SPAR
10%
20%
30%
40%
50%
60%

**Ringla um prísin**
Her kanst tú gera veruligt kvettið.
Uttan mun til hvørja hárviðgerð, ið tú ætlar tær, kanst tú ringla um prísin.

Bið um eitt ringlibikar og ringla til ein risa avsláttur upp á eitt hangandi hár.

Vit lata upp tann 17. september, á Eiði men tú kanst longu nú ringja og bíleggja eina tíð. Tilboðið er galdandi til leygardagin 22. september

TEAM85

Salong Cassiopeia v/ Marjun Poulsen • 423610 • Hvítakletsvegur 9 • 470 Eiði



Ert tú rætti ráðgevin til okkara týðandi kundar?

Virksemi okkara er í støðugum vøkstri. Tí leita vit eftir einum dugnaligum vinnukundaráðgeva til Vinnulánsdeildina í Kaupthing Bank.

Tú skalt ráðgeva okkara vinnukundum og umsita lániskjøl. Tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt, ert ágrýtin, hevur viðkomandi útbúgving og orðar teg væl bæði í skrift og talu. Hollur kunnleiki til enskt er ein fyrimunur.

Vit vænta, at tú ert fyrikomandi og positiv/ur av lyndi. Vit leggja stóran dent á, at øll okkara starvsfólk eru blíð, opin og løtt at samstarva við. Hetta er eitt spennandi starv í einum livandi virki, sum støðugt mennist. Millum starvsfólkini valdar ein góður samstarvsandi í einum frálíkum og avbjóðandi umhvørvi.

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Kristian Petersen, deildarstjóra, á 351505/551505 ella teldupost kristian@kaupthing.fo

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. september 2007. Kaupthing Bank, Bókbindaragøta 8, Postboks 8, 110 Tórshavn.

Til ber eisini at søkja starvið umvegis www.kaupthing.fo

www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK